# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-137_1.3
dags. 21-02-2011

**Mentamálaráðið**
**Att: Jenny Lydersen**

mmr mmr.fo

***Viðv.: Tygara mál nr. 70-31101/070337 -/124 um uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um fólkaskúlan***
Skriv tygara er móttikið 08-02-2011 og viðgjørt á stýrisfundi felagsins 18-02-2011.

Føroya Kommunufelag tekur í høvuðsheitum undir við ætlaðu broytingunum í fólkaskúlalógini.

Vit halda tó, at nýggja stk. 2 í §57 er óheppið. Orðingin er óivað ætlað til at noyða Vága og Sørvágs Kommunur til samstarv, hóast hvørgin tykist áhugað í samstarvi um skúlabygging. Vit halda, at talan er um stóra avmarking av kommunala sjálv-ræðinum. Vit halda harumframt, at orðingin kann skapa trupulleikar aðrastaðni. Hugsa vit okkum øki, har ein kommuna hevur stóran, men ótíðarhóskandi skúla, og grannakommunan hevur hølistørv, kann úrslitið gerast, at nýggi skúlin ikki kann byggjast – eisini um grannakommunan ikki vil ella kann nýtíðargera sín skúla?

Tað er skeivt at vísa á grannakommunu, um ætlanin er at avmarkingin er grannakommuna í somu **samstarvseind**.

Vit halda, at MMR eigur at kanna fylgjurnar av stk. 12 í § 57. Vit meta, at vandi er fyri, at onkur øki verða fyri mismuni, og tí eigur støða at takast til møguliga javning ella endurgjald.

Føroya Kommunufelag heldur ikki, at endurgjaldið fyri skúlabarnakoyring skal tengjast at ætlaðu lógarbroytingini. Talan er um annað mál, sum krevur nýggja støðutakan.

Vit halda eisini, at onkrar nýggjar orðingar í § 57 stk. 11 og 12 eiga at verða endurskoðaðar, tí tær eru heldur ógreiðar – vit hugsa serliga um orðingina: "... til tess at gera bygnaðarligar royndir at gagnnýta ..." (stk. 11) í eldri útgávu stóð: "... til tess at gagnnýta ..." henda orðing er eftir okkara tykki einfaldari og greiðari.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo